# IM-normur á Tvøroyri

**Hans Kristian Simonsen gjørdi ikki mætari enn at vinna 1st Suðuroy International og ogna sær sín fyrsta altjóða meistaranorm**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Endiliga eydnaðist tað føroyingi at vinna sær ein IM-norm í kapping í Føroyum. Teir normar, sum Flóvin Tór Næs, John Arni Nilssen og Heini Olsen eiga, eru allir komnir til høldar í kappingum uttanlands. Kollfirðingurin Hans Kristian Simonsen skrivaði tí søgu á Tvøroyri á jóansøku.


*So eydnaðist tað! Ein føroyingur vann sær IM-norm í kapping í Føroyum, har fleiri altjóða meistarar eisini tóku lut*

## Stór succes

1st Suðuroy International var ein succes á fleiri økjum. Talvliga succcesin varð sjálvsagt, at ein føroyingur vann kappingina og ognaði sær ein norm, umframt at ein ungur dani somuleiðis vann sær ein norm.

Men kanska største vinningurin er, at altjóða sterkar talvkappingar helst verða afturvendandi í Suðuroy. Høvusstuðlarnir, Supuroyar Sparikassi, Tvøroyrar Býráð og Vágs Býráð, eru nevnliga á einum máli um at stuðla tiltakinum aftur komandi ár. Tá verður farið til Vágs at telva 2nd Suðuroy International. Kappingarfyrireikarin Rani Nolsøe fegnast stórliga um samarbeiðið.

- Á hendan hátt verður eitt gott og positivt ljós sett á Føroya vakrastu oyggj, Suðuroynna, sum serliga seinasta árið hevur verið fyri skotum og lýst negativt í fjølmiðlum, segdi Rani á hugnaligu endahátíðini leygardagin.

Hjástødd á endahátíðini vóru millum annað borgarstjórarnir á Tvøroyri og í Vági og stjórin í Suðuroyar Sparikassa, Søren L. Bruhn. Søren nýtti høvið at takka fyrireikarunum og telvarunum fyri kappingina og dagarnar á Tvøroyri. Hann frøddist um normin hjá Hans Kristiani og endaði við at siga, at umframt at stuðla kappingini komandi ár, vil Suðuroyar Sparikassi eisini stuðla teimum sum kundi hugsað sær at sett talvfelag á stovn í Suðuroynni.

## Føroyingar væl við

Tað var annars John Arni Nilssen sum byrjaði kappingina best av føroyingunum. Eftir trý umfør var John Arni á odda við 2,5 stigum, men tapti síðani oddabrakið móti 17 ára gamla Jacob Vang Glud, og reistist hann tíverri ikki aftur eftir hetta.

Hinvegin helt Hans Kristian á við frálíkari telving og góðum sigrum. Undan seinastu tveimum umførunum skuldi Hans Kristian hava eitt stig fyri at ogna sær normin. Í 8. umfari tapti hann eitt spennandi talv móti Emil Hermansson og tí varð kravið ein sigur móti Ólavi Simonsen í seinasta umfarinum. Sum ætlað so gjørt. Rættiliga tíðliga fekk Hans Kristian vinnandi fyrimun og hóast hann kundi kvett høvdið av Ólavi beinanvegin í miðspælinum, vann Hans Kristian loksins talvið trygt.

6,5 stig, kappingarsigur og IM-normur. Eitt satt bragd av 21 ára gamla kollfirðinginum. Sjálvur skilti Hans Kristian ikki heilt hví tað gekk so væl hjá honum á Tvøroyri.

- Eg helt meg undan kappingina ikki vera í serliga góðum formi og havi heldur ikki telvað nakað serligt seinastu tveir mánaðirnar, segði fegni vinnarin eftir kappingina. Hans Kristian hevur ikki nakrar ávísar talvætlanir beint nú, men ivaleyst fer hann út í verðina at royna eydnuna skjótt og vinna sær fleiri normar. Møguliga luttekur hann í 4th Klaksvík International, sum eftir ætlanini verður tíðliga í heyst.

Jacob V. Glud hevði eina óføra kapping. Hann er serliga stinnur í fløktum støðum, har hann veruliga gagnnýtir síni góð roknievni. Einans nøkur fá mótstødustig viðførdi, at ungi danin mátti taka til takkar vid einum 2. plássi, hóast eins nógv stig sum Hans Kristian. Jacob hevur nú tveir IM-normar.

Emil Hermannson, John Shaw og okkara egni John Rødgaard vóru við í toppstríðnum leingi. Emil fór skutin framum Shaw og Rødgaard og fekk 6 stig og 3. plássið. Hægstrataði skotin er valla nøgdur við 4. plássið, sum hann býtti við Rødgaard, ið hinvegin var nøgdur vid síni 5,5 stig. Bádir vunnu tvey talv og leikti sjey javnleikir.

## Sjúrður prógvaði sítt talent

John Arni og Carl Eli N. Samuelsen býttu 6. plássið vid 4,5 stigum. Hetta kann John Arni, ið var triðhægst styrkismettur, sjálvsagt ikki vera heilt nøgdir við. Hinvegin var 50% skoran hjá Carl Eli í sínum elddópi í IM-kapping á góðari leið.

Oksana Vovk segði seg eftir kappingina vera nøgd við 3 stig. Og tó, hon helt sín "endaspurt", har hon einans fekk hálvt stig í seinastu fýra umførunum, vera vánaligan. Men hon vinnur sær nøkur ratingstig kortini og tá kann úrslitið ikki vera av leið.

Tvøroyradrongurin Sjúrður Thorsteinsson leikti fýra javnleikir og tapti fimm talv, og tað er í roynd og veru eitt heilt gott úrslit. Sjúrður er fullkomiliga óroyndir í slíkum kappingum og hevði eisini nógv tað veikasta ratingtalið, men kortini gav hann fleiri telvarum dygga mótstøðu. Eitt nú var hann tætt við at vinna á Hermansson, men tók til takkar við ævigum skáki og harvið einum flottum javnleiki.

Ilt er at siga hví tað gekk so mikið illa hjá Ólavi Simonsen. Hann endaði isoleraður í botninum við bert einum stigi. Ólavur fekk einki at rigga á Tvøroyri, og tá hann í summum talvum stóð væl, fann hann ikki rætta vegin fram. Vit hava brúk fyri einum sterkum Ólavi Simonsen í føroyskari topptelving aftur. Vónandi reisist hann skjótt úr skugganum aftur.

Ein spennandi og væl fyrireikað kapping er av. Vónandi hava suðringar nú fingið eitt sindur av talvi í æðrarnar aftur.

## Endaliga støðan

| Rk. | | Navn | Land | ELO | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | Simonsen Hans Kristian | FAI | 2317 | 6.5 |
| 2 | FM | Glud Jacob Vang | DEN | 2319 | 6.5 |
| 3 | IM | Hermansson Emil | SWE | 2432 | 6.0 |
| 4 | IM | Shaw John | SCO | 2454 | 5.5 |
| 5 | IM | Rødgaard John | FAI | 2331 | 5.5 |
| 6 | FM | Nilssen John Arni | FAI | 2372 | 4.5 |
| 7 | | Samuelsen Carl Eli Nolsøe | FAI | 2238 | 4.5 |
| 8 | WIM | Vovk Oksana | DEN | 2122 | 3.0 |
| 9 | | Thorsteinsson Sjúrður | FAI | 0 | 2.0 |
| 10 | | Simonsen Ólavur | FAI | 2254 | 1.0 |

## Talvið hesa vikuna

**Hans Kristian Simonsen (2317) - Jacob V. Glud (2319)**
Suðuroy International (1. umfar), 18.06.2005

**1.Rif3 d5 2.g3 Rif6 3.Bg2 e6 4.0-0 Be7 5.d3 c5 6.Ribd2** Meinlíkt einum kongaindara við umvendum litum **6...Ric6 7.e4 0-0 8.Re1 a6 9.h4 b5 10.e5 Rid7 11.Rif1 a5 12.Bf4 b4 13.Ri1h2** Hans Kristian leggur upp til kongaálop **13...a4 14.Rig5 Rid4 15.c3 Ric6 16.Fh5 h6 Støðumynd**



**Støðumynd eftir 16...h6**

**17.Rig4!?** Hóast talvforritið Fritz 7 ikki heldur hvítan fáa nóg mikið afturfyri mista riddaran á g5, so er leikurin sterkur. T.d. sær hvíta ætlanin við at fáa rókin á h-linjuna vandamikin út fyri svartan. Men svartur er hálvavegna noyddur at taka ímóti offrinum **17...hxg5 18.hxg5 g6 19.Fh4 Ricxe5?** Svartur fær mest burturúr við at fáa ein riddara á f5-puntið. Tað ger hann við at leika a3 og fáa hvítu c-finnuna vekk, fyri síðani at leika Rid4-Rif5. Torført tó at fáa eyga á við borðið **20.Rixe5 Rixe5 21.Bxe5 f6 22.Fh6 Fe8 23.gxf6 Bxf6 24.Bxf6 Rxf6 25.Bxd5** Hvítur hevur nú finnu meir og vinnandi fyrimun. Hans Kristian hevur góðan teknik og vinnur vanliga lætt slíkar støður **25...Ra7 26.Be4 Rh7 27.Fg5 Ff8 28.Fe3 Rhf7 29.Re2 Kg7 30.cxb4 cxb4 31.Rc1 Ba6 32.Rec2 Fb8 33.Kg2 Fe5 34.Rh1 g5 35.Rh7+ Kg8 Støðumynd**



**Støðumynd eftir 35...Kg8**

**36.Rxf7 Rxf7 37.Bh7+** Og svarta frúgvin er søga **1-0**